
*Anna saman við beiggja sínum Sonna, sum var pápi Bjarna, Hera og Jákup Mørkøre*

til tá í tíðini. Símun var tó ikki fyri nothing. Hann bjóðaði Onnu ein siglingartúr til Kollafjarðar at vitja familjuna hjá henni. Tey bæði fóru við deksbátinum "Rosa" hjá Carl á Lag. Og sum tann gentlemaður, sum Símun var, lat hann gentuna sleppa at stýra. Hon gjørdi ikki vandari enn at sigla innan fyri Hoyvíkshólman. Hetta var vanlig leið hjá smærri fartoyum, og hesa leiðina sigldi hon jú, tá hon fór til Kollafjarðar at ferðast við teirri "rutu", sum tá var.

## Giftust undir fótbóltsdysti

Tey giftust 26. juli 1925 í Havnar kirkju. Tað var Jákup Dahl, sum gifti tey, og framvegis bar tá bert til at verða giftur á donskum. Tey høvdu ætlað, at ikki nógv skuldu vita av, so tey løgdu víglsuna samstundis sum fótbóltsdystin undan ólavsøku. Men slíkt frættist altíð, so tað var fitt av fólki í kirkjuni.

Brúdleypið varð hildið heima hjá Jóan Jakku skómakaranum, sum var giftur við Poulinu, systir Onnu. Tað var ikki nógv gjørt burturúr tá. Tey høvdu afturfyri eitt stórt silvurbrúdleyp.

## Eitt sindur um Askham

Askham er eitt kent navn í sambandi við smiðjuarbeiði. Og her kunnu vit hóskandi greiða frá upprunan til Askhamættina, sum kom úr Bretlandi.

William Askham, ættaður úr Hull, var abbi Símun. Hann kemur fyrstu ferð til Føroyar í 1860. Hann hevur orð fyri at vera sera ágrýtin og verður umrøddur sum "spekulanturin". Hann kom til Føroyar við vørum at selja. Hann bygdi pakkhús á Eiði og fær handilsloyvi. Pakkhúsið á Eiði selur hann longu árið eftir og byrjar at handla í Fuglafirði. Í 1862 byggir hann pakkhús á Marknoyri í Vági og byrjar at keypa fisk frá hetlendskum og skotskum sluppum, sum hann virkar til klipfisk at flyta út. Hetta var áðrenn føroyingar sjálvir byrjaðu havfiskiskap.

William var pápi Tummas Askham, sum vanliga verður kallaður "Gamli Askham". Kona hansara var Julianna, fødd Johannesen, ættað av Velbastað. Hon arbeiddi hjá Østrøm á Skálatrøð og flutti við Tummasi til Bretlands,.har tey giftust. Tískil var Símun bretskur ríkisborgari.

Ólavur á Heygum, kendur framburðsmaður, fekk Tummas Askham upp til Føroya at vera á bedingini í Vestmanna.

Tummas keypti seinni smiðjuna, sum vit vanliga kalla Askhams smiðju á Skálatrøð, har Glitnir er nú.

Tá gamli legði frá sær, varð smiðjan rikin av beiggjunum Símun, Thorstein og Thomas Juul, vanliga nevndur Ullaba. Ullaba fór seinni burturúr og byrjaði smiðju fyri seg sjálvan.

Teir arbeiddu mest fyri seg sjálvar, men høvdu eisini rættiliga nógvar lærlingar. Her vóru eisini sveinar. Her var nóg mikið at gera, og hetta var serliga, tá skipini fóru um várarnar. Bretsku trolararnir góvu eisini ein hóp av arbeiði.

## Fann kodubókina hjá Lincoln City

Símun arbeiddi eisini sum kavari. Hetta kundi geva serligar uppgávur undir krígnum. Ein av teimum var, tá hann varð sendur niður eftir kodubókina hjá "Lincoln City", sum varð bumbaður og søktur á Havnarvág í 1942. Tá mátti Símun fara framvið tí deyða telegrafistinum fyri at fáa gjørt síni ørindi, sum eisini eydnaðust at enda.

Kodubókin varð tó ikki funnin beinanvegin, tí hon lá ikki har, sum skiparin segði hana vera. Hon var reyð og innbundin í blýggi, so hon skuldi søkka, um illa bar á, so hon var lættari at finna. Tað gingu fýra dagar, áðrenn Símun fann bókina. Teir dagarnar setti ovastin hjá bretska herinum, Crowther kapteynur, eyka vakt á Viðarnesi, Argjum og helst aðra staðni við. Tá kodubókin var bjargað, gjørdist arbeiðið meira avslappað. Kortini arbeiddi Símun tríggjar mánaðar við "Lincoln City". Tó varð ikki kavað hvønn dag, tí hendingin fór fram í februar, og tá er veðrið ikki altíð tespiligt á Havnarvág. Umframt lóður og djúpvatnsbumbur vórðu eisini kanónin á bakkanum, maskinbyrsurnar á brúgvavonginum og kanónin afturi á keysini tikin upp.

Símun arbeiddi eisini umborð á "Caroline Torden", sum var eitt finskt ferðamannaskip, sum varð bumbað av týskarum. Hann bøtti so frægt um skipið, at tað kundi sleipast norður í Sundalagið og setast uppá land á Hvalvíksoyruna. Her varð hol sett á hana, so eldurin endiliga kundi sløkkjast.


*Smiðjan hjá Askham*

Aftaná kríggið arbeiddi Símun eisini sum kavari, tá nýggja kain í Norðragøtu varð bygd. Tá búði hann hjá Kristinu og Eyða (Gøthe) á Fløtti. Børnini plagdu ofta at fara til Gøtu at ferðast, og onkuntíð var Anna við. Hvussu var og ikki, fyrst í 50-unum giftast elsti sonur Onnu, Thorleif, við Marjun, dóttir tey bæði Kristinu og Eyða. Marjun og Thorleif búsettust í Danmark.

Víglsan av havnini í Norðragøtu gjørdist annars minnilig, tí gestirnir fingu mateitran og leyst lív. Her var ringt skil hjá nógvum, sum nógvar søgur hava verið um. Men Símun slapp væl, tí hann hevði etið so nógv aðra staðni eisini.

Símun arbeiddi nógva staðni í landinum við havnaarbeiði. Vinskapur fyri lívið stóðst vanliga við tey hús, har tey búðu, meðan arbeitt varð sum kavari.

Tað finst ein sera vøkur søga um Símun. Í 1914 komu tveir móðurloysingar at búgva hjá Margrethu og Sigmundi av Argjum, sum búðu har Dr. Jacobsensgøta er í dag. Hesir dreingir vóru komnir úr Íslandi við pápanum Jens Fredrik Jensen, sum vildi hava nøkur av sínum børnum at búgva hjá ætt í Føroyum, eftir at mamman var deyð.

Símun Askham, sum búði á Landavegnum, kom ofta inn til tey hjá Sigmundi. Hann fekk serligan tokka til annan av hesum dreingjum, og ein dagin tók hann dreingin heim við sær. Her bleiv hann uttan nakað roks bara verandi, og her bleiv hann roknaður sum ein partur av familjuni alla sína tíð. Hann er eisini við í teirra ættartalvu.

Drongurin var Oskar Jensen, sum seinni fór aftur til Íslands, og sum doyði fyrr í ár heili 102 ára gamal. Tá ið sonur hansara Ómar vitjaði í Føroyum í 2006, kom hann sjálvandi eisini inn á gólvið hjá hesi síni føroysku "ætt".

Hjá Tummasi og Juliannu var sanniliga hjartarúm. Í Leith høvdu tey tikið sær av eini gentu, sum ongan góðan átti. Hon kom heim við til Føroyar og gjørdist eisini sum eitt barn av húsinum.

## Katolikkatrøðin

Julianna var katolikkur, meðan Tummas var baptist. Einaferð kom Tummas við Victor Danielsen inn fyri at fáa "skikk" uppá katólska prestin Boekenoogen, sum var hollendari. Men tað hendi tó


*Allar systrarnar. **F.v.** Oluffa, Poulina, Anna, Ragnhild, Poula og Martha*